## Kalt í Kanada

Veturin er av álvara farin at gera um seg í Kanada. Sjónvarpið ABC visti í gjárkvøldið at siga, at tað er óvanliga kalt nógvastaðni, og at í landspartinum Ontaroi er kuldin komin heilt niður um 50 stig. Í umráðnum norðan fyri býin Toronto er so nógvur kavi komin niður, at umleið 100.000 fólk hava mist alt samband við umheimin. Tað hevur fingið løgregluna til at mæla fólki frá at fara til økið. Sambært kanadisku veðurstovuni er kavaveðrið tað ringasta í Ontario nakrantíð.



## Bankabjarging í lagi

ES-nevndin hevur góðkent, at bretska stjórnin kann lata Royal Bank of Scotland ein bjargingarpakka við 100 milliardum pundum ella 826 milliardum krónum. Pakkin er tann størsti, sum nakrantíð er latin einari fyritøku í ES. Ein talsmaður fyri ES-nevndina segði í gjár, at nevndin hevur góðkent pakkan, tí at Royal Bank of Scotland er í ferð við munandi broytingar, sum fara at venda gongdini tann rætta vegin. Royal Bank of Scotland hevði 28 milliardir pund ella 231 milliardir krónur í halli í fjør, og so stórt hall hevur eingin banki í Bretlandi havt fyrr eitt einstakt ár.

# Seldi fyri góðar 3,3 miljónir

**Framvegis er tað toskur, sum telir størstu einstøku nøgdirnar á Fiskamarknaði Føroya, og í so máta var sølan í gjár einki undantak. Toskur er nú rættiliga komin við aftur í veiðina hjá húkaflotanum**

FISKASØLA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskamarknaður Føroya seldi í gjár tilsamans 247,3 tons av fiski á uppboðssølu fyri stívliga 3,3 miljónir krónur.

Miðalprísurin fyri øll fiskasløgini samanlagt var 13,39 krónur fyri kilo.

Størstu nøgdirnar vóru av toski 3 og toski 4, ávikavist 60 og góð 64 tons.

Miðalprísurin fyri størru toskastøddina var 14,69 krónur fyri kilo, meðan toskur 4 fór fyri miðalprísin 9,37.

Sløk 9 tons vóru av toski 2, sum fór fyri miðalprísin 23,37, og góð 3 tons vóru av toski 2, sum fekk miðalprísin 26,37.

Umleið 45 tons tilsamans vóru av hýsu, og besta miðalprísin fekk hin størsta hýsan, 12,28 krónur fyri kilo.

Nógv tær størstu nøgdirnar av hýsu á marknaðinum í gjár vóru hýsa 2, sum fekk miðalprísin 10,35. Her var talan um stívliga 32,6 tons.

Eini 5,5 tons vóru av svartkalva, sum fekk miðalprísin 25,46.

Av øðrum nevniverdum nøgdum á fiskamarknaðinum í gjár var havtaska, sum enn einaferð táttaði í 40 krónur fyri kilo.

Nakað var av longu og brosmu. Besti miðalprísur fyri longu var slakar 10 krónur fyri kilo, meðan besti brosmuprísurin var 5,30.

Nøkur fá hundrað pund vóru av kalva, og her var besti prísurin 51 krónur fyr kilo.



*Fiskamarknaður Føroya seldi í gjár tilsamans 247,3 tons fyri stívliga 3,3 miljónir krónur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Áhugaverdur Orkudepil á Kambsdali

**Dánjal Vang, sum er býráðslimur og varaborgarstjóri í Fuglafjarðar kommunu, heldur orkuverkætlanina á Kambsdali vera sera áhugaverda**

ORKUDEPIL

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Á eykaaðalfundi hjá SEV fyri ein tíð síðan greiddi Dánjal Vang, býráðslimur og SEV-umboðsmaður úr Fuglafirði frá orkudeplinum á Kambsdali.

Hann segði, at tvær vindmyllur skulu setast upp í sambandi við depilin. Hesar skulu framleiða streym umvegis elektrolýsu og sonevndar brennikyknir.

– Nýggjasta tøknin við elektrolysara, spaltar vatn til brint og oxygen. Frá vindi til brint fáa vit 85% í úrtøku, segði hann.

Dánjal Vang legði aftrat, at frá brinti umvegis brennikyknir til el, er úrtøkan 75%.

Hetta merkir, segði SEV-umboðsmaðurin, at vit soleiðis fáa gjørt óstøðuna vindorku til støðuga orku, ið kann latast beinleiðis út á netið.

Hann vísir á, at 300 fermetra stórir sólfangarar eru settir upp, og hesir skulu hita skúlarnar á Kambsdali upp.

– Herfyri helt Orkudepilin eitt tveir dagar langt seminar í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Fólk úr 12 londum vóru við, og eisini vóru umboð fyri Risø, Danmarks Tekniske Universitet, Dansk Teknologisk Institut, universitetini í Álboreg umframt umboð úr Ulster og Finland.

Á nevnda eykaaðalfundi hjá SEV endaði Dánjal Vang við at bjóða øllum á Kambsdal at síggja verkætlanina og at fáa eina nærri frágreiðing um Orkudepilin.

### Orkuverkætlan

Dánjal Vang sigur, at Føroyar í altjóða høpi verða mettar sum smásamfelag, og tí hevur Bass í Danmark stóran áhuga fyri Føroyum, sí www.bass.dk.

– Bass hevur soleiðis bjóðað Orkudeplinum á Kambsdali at verða við sum partnara í orkuverkætlan, sum skal menna Føroyar innan hesa tøkni, sigur býráðslimurin og varaborgarstjórin í Fuglafjarðar kommunu, Dánjal Vang.